## Hann er ikki valevni

Seinastu tíðina hava bæði danskir og útlendskir fjølmiðlar nevnt, at danski forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, skal taka við sum formaður í ES-nevndini í summar, tá Romano Prodi fer frá.

Men í samrøðu við tíðindastovuna Ritzau avsannar forsætisráðharrin, at hann er evni til formansstarvið. Hann sigur, at hann trívist væl í forsætisráðharraembætinum, og at hann framvegis hevur nógvar politiskar ætlanir, sum hann ætlar sær at seta í verk.

Í hinum ES-londunum fekk danski forsætisráðharrin rós fyri ta tíðina, hann var formaður í ES. Tað var júst í hansara formanstíð, at samráðingarnar við tey eysturevropeisku londini vórðu avgreiddar, og tað vóru serliga tær, sum fingu útlendskar og danskar diplomatar at tosa um, at forsætisráðharrin hevði egnað seg væl sum formaður í ES-nevndini. Onnur halda kortini, at avgerðin hjá Danmark at stuðla USA í krígnum við Irak skerdi møguleikar hansara, serliga tí at Týskland og Frakland tóku eina aðra støðu.

## Statoil liggur framvið

Statoil ætlar sær at sleppa upp í part, tá russar um ikki so langa tíð fara at vinna gass úr teimum risastóru keldunum í Barentshavinum.

Russar umhugsa at byggja eina frystigoymslu til gass nærhendis Murmansk. Her heldur Statoil seg hava ein fyrimun at sleppa upp í part, tí norska felagið er júst í ferð við at byggja eina slíka frystigoymslu nærhendis Hammerfest í Norðurnoregi. Russisk umboð hava longu verið og hugt at nýggju frystigoymsluni, sum fer at kosta einar 40 milliardir krónur, tá hon er liðug.

Har eysturi í Barentshavinum hava russar funnið nakrar av teimum størstu gasskeldunum í heiminum, men fyribilskanningar vísa, at tað fer at kosta fleiri hundrað milliardir krónur at fáa gassið haðani og at gera tær neyðugu íløgurnar á landi. Russar eru ikki so frammarlaga á tí tøknifrøðiliga økinum sum norðmenn, og tí væntar Statoil at fáa nakað burtur úr tí ætlaða samstarvinum við russar.

## Hitin hóttir skíðvinnuna

Tann veksandi hitin á Jørðini er vorðin ein hóttan fyri tær skotsku fyritøkurnar, sum um veturin plaga at vinna pengar burtur úr fólki, sum dáma væl at standa á skíð.

Sambært Reuters er so lítil kavi í teimum skotsku fjøllunum, at tað ber næstan ikki til at standa á skíð har, og í síðstu viku kunngjørdi eitt felag, at tað hevði gjørt av at gevast við sínum virksemi. Ein talsmaður hjá felagnum sigur við Reuters, at tann altsamt veksandi hitin er vorðin ein sonn hóttan ímóti allari skotsku skíðvinnuni.

Men tað eru ikki bara skotar, sum kæra seg um hitan. Í Sveits sýta bankarnir fyri at fíggja skíðpláss, sum eru niðan fyri 1500 metra hædd, tí teir vænta ikki at fáa pengarnar aftur. Útlitini eru heldur ikki tey bestu. Ein frágreiðing, sum ST kunngjørdi herfyri, sigur, at hitin á Jørðini fer at veksa tey næstu 50 árini.

## Eingir pengar til standmynd

Næsta ár eru 100 ár, síðani norska kongsveldið varð endurskipað, og í tí sambandi hevur norski sendiharrin í Bretlandi arbeitt við einari ætlan um at reisa eina standmynd til minnis um drotningina Maud. Hon var ensk prinsessa, men gjørdist norsk drotning, tá hon giftist danska prinsinum Carl, sum gjørdist norskur kongur í 1905.

Ætlanin er, at myndahøggarin Ada Madssen skal gera standmyndina, men trupulleikin er, at sendiharrin hevur ikki nóg mikið av peningi til arbeiðið, sjálvt um bæði tað norska og tað enska kongshúsið hava sagt seg taka undir við ætlanini hjá sendiharranum.

Tað er heldur ikki avgjørt, hvar í Onglandi standmyndin av Maud drotning skal standa, verður hon gjørd. Tað hevur verið upp á tal at seta hana í London ella í Sandringham í Norfolk.

# Nýggju limirnir fáa strong krøv

**Tann 1. mai koma tey eysturevropeisku londini upp í ES, men fólk haðani eru ikki vælkomin til Bretlands**

ES
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Eins og í hinum ES-londunum stúra bretar fyri, at nógvir eysturevropearar fara at leita sær vesturum, tá lond teirra fáa limaskap í samveldinum tann 1. mai.

Men tey verða ikki boðin vælkomin. Tony Blair, forsætisráðharri, hevur nú góðkent reglur, sum skulu avmarka møguleikarnar hjá eysturevropearum at kenna seg væl í Bretlandi. Sum er hava innflytarar rætt til bretskar almannaveitingar, tá teir hava verið seks mánaðir í Bretlandi, men sambært blaðnum The Independent verður hendan bíðitíðin nú longd til tvey ár.

Eitt annað blað, The Guardian, sigur seg hava fingið at vita, at stjórnin hevur fingið heimild til at krevja av arbeiðsgevarum, at teir skulu søkja um arbeiðsloyvi til fólk úr teimum nýggju limalondunum. Tað er ikki neyðugt, tá talan er um fólk úr teimum núverandi ES-londunum.

Øll ES-londini uttan Írland hava boðað frá, at tey fara at fremja tiltøk, sum skulu avmarka møguleikarnar hjá teimum nýggju ES-búgvunum.

# Vann aftur

John Kerry, senatorur, vann eisini uppstillingarvalið í statinum Wisconsin gjáranáttina. Men sigurin hesaferð var munin teprari enn í hinum statunum.

Í Wisconsin fekk John Kerry 40 prosent av atkvøðunum, men rættiliga óvæntað fekk John Edwards 35 prosent. 2. mars verður uppstillingarval í fleiri statum, og hildið verður, at tann tepri ósigurin hjá John Edwards hevur bøtt um møguleikar hansara. Kortini er John Kerry framvegis langt frammanfyri.



# Putin bíðaði til fánýtis

**Russiski forsetin, Vladimir Putin, var boðin at hyggja, tá russiski herflotin skuldi skjóta tvær stórar rakettir týsdagin. Putin bíðaði í torninum á einum kavbáti, men har kom eingin rakett**

VENJING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Seinastu dagarnar hevur russiski Norðurflotin havt eina stóra venjing í Barentshavinum, og týsdagin var Vladimir Putin, forseti, boðin at hyggja, tí ein kavbátur skuldi skjóta tvær stórar rakettir, sum kunnu løðast við kjarnorkuvápnum.

Forsetin stóð í torninum á einum øðrum kavbáti saman við fleiri av teimum ovastu leiðarunum í russiaka flotanum. Men einki hendi, tá menn trýstu á knøttarnar. Hvørki tann fyrra ella tann seinna rakettin fóru uppfrá.

Tað er ikki komið fram, hvat forsetin helt um avrikið, men seinasta hósdag segði hann, at herflotavenjingin var týdningarmikil, tí hon skuldi vísa umheiminum, at russiska hermegin er ein týðandi partur av landsins trygdarpolitikki.





Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Sólfríð Viderø:

# 25 ára starvsdag hjá Postverkinum



15. februar hevði Sólfríð Viderø í Hoyvík 25 ára starvsdag hjá Postverki Føroya.

Sólfríð f. Eliasen, er ættað úr Klaksvík, dóttir Kathu og Louis Eliasen. Hon arbeiddi í klædnahandlinun hjá Kjølbro í Klaksvík, áðrenn hon í 1975 kom til Havnar, har hon fekk arbeið í Skálabúðini og var har í fýra ár.

Síðan 15. februar 1979 hevur hon verið í føstum starvi hjá Postverki Føroya, og hevur meginpartin av tíðini arbeitt í umsitingini.

Sólfríð er gift við Jógvani Viderø av Sandi, tey búgva í Hoyvík og eiga synirnar Høgna og Bjørn.

## Tøkk



Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum gjørdu okkum diamantbrúdleypsdagin tann 27. desember 2003 so festligan.

Takk fyri gávur, blómur, fjarrit, talur og uppringingar. Takk tit, sum hjálptu til. Serliga takk til Páll, Elsu, Fridu og Malenu, sum gjørdu tað møguligt fyri okkum at halda dagin heima.

**Heilsan**
**Kitty og Pollaba Poulsen, Klaksvík**

## Eivin Olsen 50 Ár

Í dag, hósdagin 19. februar, fyll ir Eivin Olsen bedingsmeistari á Skála 50 ár.

Eivin er sonur gamla bedingsmeistaran, Jógvan Olsen, og Kristensu. Hansara lívsstarv bleiv so sjálvandi á bedingini, har hann so ruddiliga hevur slitið sínar barnaskógvar upp.

Eivin er hegnismaður og dugir sera væl at skipa fyri og fáa alt at bera til. Við sínar leiðandi menn sigur hann ofta: »sigið tit bara til, tað gongur nokk«.

Eivin kann sostatt vónandi hátíðarhalda at tað í mai mánað verða 100 ár liðin, síðan bedingin var tikin í nýstlu, og mong eru tey skipini, sum hava verið á beding hesi hundrað árini, og nógv tey flestu hava hann og hansara familja tikið sær av at fingið avgreidd.

Eivin hevur verið virkin sum fakfelagsmaður og hevur í mong ár verið stjórnarlimur í Skála Arbeiðsmannafelag, og hetta starv gekk hann upp í við lív og sál. Eisini innan ítróttin hevur hann verið virkin, og sat hann sum formaður í Skála Ítróttarfelag, tá avgjørt var, at Skála skuldi taka sær av fótbólti og Strendur av hondbólti, hetta fyri at ítróttargreinarnar skuldu vera betri skipaðar, og størri samanhald skuldi verða ímillum bygdirnar.

Til seinasta kommunuval stillaði Eivin upp og var valdur. Hansara hjartamál vóru serliga at skaffa ungum familjum grundstykkir, at gera karmarnar um at ansa børnum betri og so at fáa bygdina vetrarfriðaða fyri seyð. Hesi skjótt fýra árini mugu vit siga, at væl er komið á skaftið, tó væntar enn vetrarfriðingin, men eisini her er vón fyri framman, takkað verið hansara ágrýtni. Eivin er eitt sindur tvørur og gevst ongantíð við tí, hann hevur sett sær fyri.

Seyðahald hevur nú eisini fingið hansara áhuga, og nú pápin hevði hug at gevast, tók Eivin við, og hvønn døgurðatíma fer hann inn í Miðhaga at geva seyðunum.

Eivin er giftur við Sigrun, og saman eiga tey børnini: Annu, Poulu, Jónu, Jákup og Anton.

Eivin og familjuni verður ynskt hjartaliga tillukku við teimum hálvhundrað árunum.





MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin

## Dagurin

**19. februar. Ammon,** deyður umleið ár 250. Var ein av teimum rómversku hermonnunum, sum við at síggja dirvi og trúarvissu teirra kristnu, sjálvur gjørdist kristin og varð tikin av døgum.